# Løgmaður ikki sagt samgonguna upp



*Løgmaður harmast um at hava mist Jørgen Niclasen, men hann sigur seg ikki hava sagt samgonguna upp*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Lagið er ikki gott á fólkafloksmonnum í hesum døgum, men Anfinn Kallsberg vil kortini ikki siga samgonguna upp**

POLITKKUR
*Theodor E. D. Olsen*

Eftir valið brúkti løgmaður møguleikan í okkara enn nýggju stýrisskipanarlóg at verða sitandi, hóast hann ikki var formaður í størsta flokinum. Hetta vóru ikki øll fegin um. Týsdagin noyddi Løgtingið ein landsstýrismann at siga seg úr starvi, og tað er løgmaður nú harmur um.

Lagið er nevniliga ikki gott í Fólkaflokkinum í hesum døgum, men Anfinn Kallseberg, løgmaður, hevur ongar ætlanir um at gera stórvegis broytingar í síni stjórn.

– Fólkafloksmenn eru harmir um støðuna, men vit hava havt eitt gott samstarv í samgonguni, sigur løgmaður, tá hann verður spurdur, hvussu framtíðin hjá Landsstýrinum sær út, og um hann kann góðtaka, at Tjóðveldisflokkurin segði seg vilja atkvøða fyri einum misáliti á Jørgen Niclasen. – Vit hava ikki sagt nakra samgongu upp, men vit hava sagt, at um Tjóðveldisflokkurin atkvøður fyri einum andstøðuuppskoti, so skapar hetta missljóð, og hetta hevur skatt álitið, og tí verður stevið ikki tað sama, tí eitt samgongustarv byggir upp á álit, sigur Anfinn Kallsberg.

## Pressan burtur úr vón og viti

Í løtuni umsitur hann sjálvur fiskivinnumál, sum hann metir vera eitt sera stórt og umfevnandi málsøki. Enn vil løgmaður tó ikki siga, hvør kemur at taka sær av Fiskimálaráðnum, ella nær ein nýggjur landssýrismaður verður settur í tann sessin. Men Anfinn Kallsberg væntar tó ikki stórvegis broytingar í fiskivinnupolitikkinum, tí linjan hjá Jørgen Niclasen er løgd í lógini, sum hann málber seg.

Løgmaður sigur seg vera sera harman um, at Jørgen Niclasen noyddist at fara frá, og honum hóvar ikki handfaringina hjá fjølmiðlunum í hesum máli, sum hann sigur vera burtur úr vón og viti. Hann heldur, at pressan dømdi við brestin, og hevur ikki verið serliga objektiv. Løgmaður vil tó ikki siga júst hvørjar miðlar, hann meinar við, men sigur so mikið, at summir miðlar eru meira slagkraftigir enn aðrir, sum hann orðar seg. – Viðhvørt liva landsstýrismenn undir ómenniskjansligum korum. Um hetta er rætt ella skeivt, veit eg ikki, men vit mugu øll ansa eftir hvørjum øðrum, sigur løgmaður.

Sjálvur vardi hann leingi Jørgen Niclasen, men tá trýstið úr Løgtinginum varð ov stórt, noyddist sjálvt løgmaður at ásanna, at møguleikin fyri at fáa misálit í føroyskum politikki er til staðar.



*Stemingurin er ikki góður í Fólkaflokkinum í løtuni eftir at andstøðan og Tjóðveldisflokkurin feldu ein av teirra landsstýrismonnum*

## Umbering

Í Sosialinum 14. januar í ár varð grein um smugling av narko, har vit eisini høvdu mynd av fleiri persónum. Nýtsla okkara av hesi mynd var eitt mistak, tí persónarnir á myndini eru ikki undir illgruna ella hava nakað við sakina at gera. Sosialurin vil tí koma við eini treytaleysari umbering fyri hetta mistakið.

**Blaðstjórin**



# Tað nyttar ikki at vera fornermaður

**Jøregn Niclasen er ikki landsstýrismaður longur. Týsdagin noyddi Løgtingið hann frá, meðan fjølmiðlarnir eltu ein vrakaðan mann, sum ongan møguleika hevði at fjala, at hann táraði.**
**– Hatta er ikki nakað, sum eg avgeri, sigur Jørgen Niclasen um valið hjá SvF at suma inn á andlitið hjá honum, tá harðast stóð á**



*Tað kann vera hart at vera landsstýrismaður, og í síni ráðharratíð uggaði Jørgen Niclasen seg ofta við, at pressan ikki skrivaði um privatlívið hjá politikkarunum. Nú er hann aftur løgtingslimur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*

– Mín politiski veruleiki er øðrvísi í dag.

Hetta segði Jørgen Niclasen, fyrrverandi landsstýrismaður, tá Sosialurin ringdi til hansara í gjár. Sjálvur segði hann seg síggja støðuna innanífrá, tí hann var staddur vesturi í hembygdini, Sørvági, har hann sleikti tey politisku sárini og hugsaði nýggjar leikir í tí stóra talvunum, hann hevur verið partur av so leingi. Týsdagin noyddist hann kortini at leggja kongin í hesum umfarinum.

– Tað nyttar ikki at vera fornermaður, tí politikkur er eirindaleysur. Men tú minnist, tað sum er gjørt ímóti tær, og tí eri eg ein keddur maður í dag, sigur Jørgen Niclasen, eftir at hann varð noyddur av andstøðuni og Tjóðveldisflokkinum at biðja løgmann loysa seg úr starvi. Annars hevði Løgtingið atkvøtt hann úr Fiskimálaráðnum, og tá er ikki so lætt at koma aftur í aftur í politikki.

Spurdur, um hann væntar at sleppa út aftur í Tinganes í onkrari aðrari samgongu, sigur Jørgen Niclasen við sínum ógvusliga myndamáli, at hann hevur fingið ein knív í ryggin uttan at hava gjørt nakað skeivt politiskt ella løgfrøðiliga, og tí fer hann frá við upprættaðari pannu, sum hann málber seg.

– Men har spælir nógv inn, ikki minst veljarin, tí eg eri bara ein brikkur í tí stóra spælinum. Eg havi tó ongantíð viljað givið upp, og aldurin er enn ikki so høgur, sigur tann skjótt 34 ára gamli Jørgen Niclasen, sum var týðiliga merktur, tá hann týsdagin á tingsins røðarapalli segði ráðharrasessin frá sær.

– Tað góða orðið hevur meira at siga, enn vit geva okkum far um, sigur Jørgen Niclasen, sum bæði hevur fingið telefonuppringingar og sms-boð, síðani tað politiska tapið varð varpað út í loftmiðlunum um alt landið. – Men hini, sum ikki hava nakað gott at bera mær, høvdu nokk ikki ringt, leggur tó ein reellur Jørgen Niclasen afturat.

## SvF sumaði

Spurdur, hvat hann heldur, at t.d. Sjónvarp Føroya gjørdi ov nógv burtur úr, tá hann feldi tár og ristist á røddini í tingsalinum, sigur Jørgen Niclasen, at hann enn ikki hevur sæð allar upptøkurnar frá sjálvum fundinum, har myndatólið sumaði inn á andlitið á honum, tá harðast leikaði á. Hann heldur tó ikki, at sjónvarpið var so ringt, tí teirra myndatól stóð eitt sindur burtur frá sessinum hjá sær, og tað flutti seg ikki teir tríggjar tímarnar, tingfundurin vardi.

Verri var kortini við fotografunum, sum allatíðina fluttu seg á vóru klárir at finna nýggjar vinklar undir orðaskiftinum.

– Men hatta er ikki nakað, sum vit avgera, sigur ein róligur Jørgen Niclasen um fjølmiðlarnar, og kallar teir ta fjórðu statsmaktina.



*Jenis av Rana heldur saman hendur í tingsalinum. Týsdagin vildi hann tó ikki avdúka, um hann fór at halda hondina yvir Jørgen Niclasen, tí hann vildi ikki siga, um hann fór at atkvøða fyri misáliti*

## Hart trýst

Hann er ikki tann fyrsti landsstýrismaðurin, sum hevur verið noyddur at víst sínar kenslur á skíggjanum, og tá Sosialurin spyr hann um trýstið, ið liggur á einum ráðharra í Føroyum, sigur Jørgen Niclasen, at hann plagar at spyrja fólk, hvussu tey høvdu havt tað, um tey ofta høvdu staðið á forsíðuni í bløðunum. – Tað er nevniliga rættiliga óbehagiligt at verða hunddálkaður, og trýstið er enormt, og tað pínir, tá tú heldur teg hava eina góða sak, sigur Jørgen Niclasen.

Men hann leggur tó afturat, at teir føroysku fjølmiðlarnir vita, at samfelagið er lítið, og tí hanga teir ikki privatlívið hjá fólki út, sum pressan kanska ger í øðrum londum. So ta tíðina Jørgen Niclasen var landsstýrismaður uggaði hann seg við, at tað ikki var privatpersónurin, sum endaði á forsíðunum. – Men eg havi fingið harða húð, sigur Jørgen Niclasen, sum nú aftur telist millum tey 32 í Løgtinginum.

## Vil enn einki siga

Spurdur, um hann hevði væntað, at tingfundurin, har uppskotið frá andstøðuni varð viðgjørt, bleiv so drúgvur, sigur Jørgen Niclasen, at talutíðin til eitt misálitisuppskot er sama sum til eitt fíggjarlógaruppskot, so tað gjørdi hann ikki bilsnan.

Hann hevur einki boð upp á, hvør eftirmaður hansara sum fiskimálaráðharri verður, men hann sigur tað sama við Sosialin, sum hann segði í Degi og Viku týskvøldið um sín leiklut sum samgongutingmaður. – Mín loyalitet fyri Tjóðveldisflokkinum vil eg ikki siga nakað um í løtuni, tí so komi eg bara at siga okkurt, sum eg fari at angra, tí hetta má sodnast, sigur Jørgen Niclasen at enda.


Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til PE at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Tann, ið verður settur sum lærlingur, kemur at luttaka í øllum ti dagliga arbeiðinum í handlinum, og kemur at hava sjálvstøðuga ábyrgd av ávísum økjum.

Arbeiðstíðin er ásett til 40 tímar um vikuna, men roknast kann í ávísan mun við yvirtíðararbeiði.

**Førleikakrøv**
Tað er kravt, at tú hevur eina vanliga handilsskúlaútbúgving (FHS).

Tað er ein fyritreyt, at tú ert fyrikomandi, álitandi og kundavinarlig/ur og hevur góð samstarvsevni. Harumframt skalt tú kunna laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn saman við avriti og møguligum viðmælum skal vera PE í hendi í seinasta lagi 31.01.2003.

Nærri upplýsingar um læruplássið fáast við at venda sær til Petur Eirik Djurhuus á tel 31 10 55 ella 21 13

SAMKEYP PE

Stoffalág 33 · 100 Tórshavn · tel 31 10 55 · p-e@post.olivant.fo